

# Jólastjørnur í NEW YORK

Tá jólatræið verður tendrað við Rockefeller Center 29. november verður stjørnan ovast á trænum ikki tann bjartasta. New York hevur fingið Christina Aguilera, Enya, Sarah McLachlan, Sting, Martina McBride, John Legend, Bette Midler, Lionel Richie og vinnarin av American Idol Taylor Hicks at syngja jólasálmar og aðrar jólasangir í sambandi við at træið verður tendrað, hetta skrivar tv2.dk. Fyri at restin av Amerika eisini kann fylgja við í hesi hugnaligu og jólaligu hending verður øll løtan send beinleiðis í sjónvarpinum. Christina Aguilera er í løtuni á konsertferð í Evropa, men flýgur heim til USA fyri at luttaka.

nud

Christina Aguilera fer allan vegin úr Evropa til USA at syngja jólasangir



Flott sær tað út, tá jólatræið við Rockefeller Center er tendrað

# JUSTIN TROYSTAR BRITNEY

Britney Spears hevur ringt til gamla vinmannin og fyrrverandi sjeikin Justin Timberlake, nú hon roynir at koma yvir kollsiglda hjúnarlagið við Kevin Federline. Sambært tv2.dk hevur Britney fleiri ferðir ringt grátandi til Justin, eisini áðrenn hon søkti um at verða skild. Heimasíðan metir tað vera sannlíkt, at sangurin »What Goes Around...Comes Around« á nýggju fløguni hjá Justin Timberlake er bygdur á hesar samrøður. Teksturin er m.a.:

You spend your nights alone
And he never comes home
And every time you call him
All you get is a busy tone
I heard you found out
That he's doing to you
What you did to me.

**nud**



Justin Timberlake og Britney Spears vóru fremsta parið í showbiz fyri nøkrum árum síðan



Borat hevur traðka á nógvar tær.

# Draga Borat í rættin

Røðin av sakarmálum móti 20th Century Fox í sambandi við filmin um Borat stendur í vøkstri. Seinasti luttakarin, ið ikki er nøgd við at verða vist í filminum um Borat, er sambært dr.dk Cindy Streit, ið rekur eitt felag í Alabama, sum lærir fólk fólkaskikk. Í filminum gevur Borat m.a. Cindy ein posa við avføringi. Hon sigur, at hon fekk at vita, at talan var um ein dokumentarfilm, ið einans skuldi vísast í Hvitarusslandi og ikki um ein heimsumfatandi skemtifilm. Sambært 20th Century Fox so er hetta tvætl, talsmaður hjá filmsfelagnum Gregg Brilliant sigur, at filmsfelagið gjørdi ein veruliga avtalu við Streit og hon fekk somuleiðis gjald fyri hesa avtalu. Men 59 ára gamla Cindy umhugsar nú eitt rættarmál, skrivar dr.dk.




Bono fær nú hattin aftur frá stylistinum, ið tók hattin frá honum í 1987.

# U2 VANN EIN HATT OG NAKRAR OYRARINGAR

U2 vann í síðstu viku rættarmálið móti sínum fyrrverandi stylisti Lola Cashman, og hon noyðist nú at geva Bono sín Stetson hatt, eitt par av kreolara oyraringum úr málmi, eina grøna blusu og eitt par av svørtum buksum. Hetta eru alt klæði, ið U2 hevur brúkt, og sum Lola tók frá bólkinum, tá hon arbeiddi saman við teimum í 1987. Í 2002 setti hon tingini á uppboðssølu á heimskendu uppboðssøluni Christies. Tá bólkurin hoyrdi hetta, fekk hon boð frá teimum, um ikki at selja lutirnar. Hetta fann hon seg ikki í og fór tí í rættin við bólkinum, skrivar dr.dk.

Lola vildi vera við, at hon hevði fingið lutirnar frá bólkinum, m.a. Stetson hattin, ið Bono er í á Rattle and Hum húsanum. Men nú hevur rætturin avgjørt, at tað hevur hon ikki, tí noyðist hon at lata U2 lutirnar aftur.

**nud**

